Gekk skjótt at telja upp

Klaksvík: Tað gekk rættiliga skjótt at telja atkvøðurnar upp í Klaksvík. Valdyrnar vórðu læstar klokkan gott átta, og longu klokkan 21 vóru tær 2.987 atkvøðurnar upptaldar. Men so vóru góðar 200 brævatkvøður afturat – umframt atkvøðurnar úr Árnafirði, Mikladali og Trøllanesi. Karl Johansen, formaður í valstýrinum í Klaksvík, segði, at hóast tað gekk nakað skjótari at telja atkvøðurnar í Klaksvík upp, so var endaliga úrslitið ikki so nógv fyrr klárt.

– Klokkan var um 21.30, tá endaliga úrslitið var klárt, og tað er áleið, sum tað plagar at vera, segði formaðurin í valstýrinum í Klaksvík.

Kalsoyggin fekk einki umboð

Klaksvík: Klaksvíkar og Mikladals kommunu hava gjørt av at leggja saman, men á býráðsvalinum hesaferð eydnaðist tað ikki nøkrum av teimum uppstilladu úr Kalsoynni at koma í býráðið.

Signhild V. Joensen av Trøllanesi hevði eitt sera gott val, og hóast hon er púra nýggj í politikki, fekk hon 99 atkvøður.

Hon megnaði tó ikki at syfta verandi umboðum hjá Javnaðarflokkinum, tí hon manglaði 12 atkvøður í at fara fram um Torleif Sigurðsson.

1-0 til Unu

Klaksvík: Venjarin hjá Stjørnuni og ein av kvinnuspælarunum stillaðu bæði upp á býráðsvalinum í Klaksvík.

Una Olsen, sum er strikuspælari hjá Stjørnuni, stillaði upp fyri Fólkaflokkin og fekk 33 atkvøður.

Venjarin Svein Rógvi Nielsen var á Sjálvstýrislistanum, og hann fekk 22 atkvøður.

Hvørgin var í nánd av býráðnum, men Una Olsen kann í øllum førum kalla seg politiskan toppskorara hjá Stjørnuni.

Nýtt ættarlið kom í býráðið

Fleiri royndir býráðspolitikarar eru farnir úr Klaksvíkar býráð, og eitt nýtt ættarlið av politikarum bjóðar seg fram. Borgarstjórin setti met í atkvøðum, og hóast stóri minnilutaflokkurin vann eitt umboð, so er meirilutin framvegis meiriluti

BÝRÁÐSVAL
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Kommunuvalið í Klaksvík broytti lítið og einki í býtinum millum flokkarnar, og meirilutin í býráðnum varðveitti sín meiriluta.

Einasta broytingin var, at Fólkaflokkurin fekk eitt umboð afturat, og tað umboðið kom frá Kristiligi Fólkaflokkinum, sum ikki stillaði uppaftur.

Stór útskifting var tó í býráðslimum, tí heili 5 av 11 limum vóru skiftir út.

Frammanundan var greitt, at Jógvan við Keldu, Betta Joensen og Hilmar Danielsen ikki fóru at halda fram, tí tey stillaðu ikki uppaftur. Men harafturat noyddust eisini Karl Heri Joensen og Erik Andreasen at læta í hørðu kappingini um teir ellivu sessirnar.

Flestu av teimum nýggju býráðslimunum eru púra óroyndir í kommunalpolitikki, og talan er í roynd og veru um eitt nýtt ættarlið av politikarum, sum nú sleppur fram at.

Steinbjørn Jacobsen setti met, Eyðgunn Samuelsen styrkti munandi um sína støðu, og Jákup Mikkelsen kom aftur í býráðið
Mynd: Solby Eliasen

Fólkaflokkurin skifti út

Fólkaflokkurin skifti tað mesta av sínari manning út, og nú flokkurin hevði framgongd við 200 atkvøðum, fekk hann sín fjórða býráðslim aftur. Av teimum, sum sótu í gamla býráðnum, heldur bara Kristian Fríðrik Olsen fram.

Hinvegin eru Gunvá við Keldu, Atli Justinussen og Jákup Mikkelsen nýggj í býráðnum, hóast Jákup Mikkelsen hevur átta ár royndir frá kommunalpolitikki í áttatiárunum.

Sambandsflokkurin skuldi hava nýggjan býráðslim fyri Bettu Joensen, og flokkurin kláraði inn um aftur við Hans Arna Bertholdsen sum nýggjum umboði.

Eyðgunn styrkti seg

Kappingin í Javnaðarflokkinum var hørð, og tað hevði eisini við sær, at flokkurin fekk einar 60 atkvøður fleiri hesaferð.

Eyðgunn Samuelsen fór enn einaferð fram í atkvøðutalið, og hon gjørdist greiður toppskorari á listanum við 201 atkvøðum. Torleif Sigurðsson kom eisini innaftur við 110 atkvøðum, meðan Signild V. Joensen og Tummas Lervig, sum vóru fremstu kappingarneytarnir, gjørdust ov stutt hesaferð.

Sjálvstýrisflokkurin fekk eisini nýggjan býráðslim, hóast tann royndi politikarin Karl Heri Joensen stillaði uppaftur. Hann var syftur av tí 30 ára gamla Kristian Eli Zachariasen, sum fekk tríggjar atkvøður fleiri.

Borgarstjórin skapti framgongd

Tjóðveldisflokkurin hevði eitt sera gott val seinast, og hesaferð fór flokkurin enn einaferð fram. Tað var fyrst og fremst takka veri einum kanónvali hjá borgarstjóranum Steinbjørn O. Jacobsen. Hann setti met við 391 atkvøðum.

Hinir báðir býráðslimirnir hjá flokkinum vóru eisini afturvaldir, og tað var eitt langt lop frá Jórun Høgnesen og Rana Nolsøe og niður til tey næstu á listanum.

Kristiligi Fólkaflokkurin, sum seinastu 12 árini hevur havt býráðslim í Klaksvík, stillaði ikki uppaftur, og tí var Hilmar Danielsen ikki afturvaldur.

Úrslitið í Klaksvík

Fólkaflokkurin	4 umboð
Sambandsflokkurin	1 umboð
Javnaðarflokkurin	2 umboð
Sjálvstýrisflokkurin	1 umboð
Tjóðveldisflokkurin	3 umboð

3048 fólk vóru á vali
Valluttøkan var 85,2 prosent

Árnfirðingur streyk inn

Fyri fyrstu ferð í 72 ár hevur Árnafjørður fingið umboð í Klaksvíkar býráð. 33 ára gamli Atli Justinussen var valdur í fyrstu royndin í kommunalpolitikki

BÝRÁÐSVALIÐ
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Atli Justinussen hevur í nógv ár verið partur av frítíðar- og handilslívinum í Klaksvík, og nú skal hann eisini sita í Klaksvíkar býráði.

Árnfirðingurin hevur verið við í kjakinum í lokalu fjølmiðlunum í fleiri ár, men hetta var fyrsta ferð, at hann stillaði upp.

– Eg havi havt góð fólk at arbeiða fyri meg, og tey hava gjørt eitt stórt arbeiði. Stuðulin í Árnafirði hevur verið sera stórur, men eg havi eisini fingið nógvar atkvøður í Klaksvík, sigur hann.

Atli Justinussen fekk 27 av teimum 39 atkvøðunum í Árnafirði, men tað er bara ein lítil partur av teimum 116 atkvøðunum, sum hann fekk á valinum.

Leingi at bíða

Tað eru liðin 72 ár, síðani Árnafjørður seinast hevði umboð í Klaksvíkar býráð. Tað var Guttorm Olsen, sum sat síðst í 20'unum og fyrst í 30'unum.

– Tað er gott, at bygdin hevur fingið umboð aftur, men tað hevur verið ov leingi at skula bíða eftir tí í 72 ár, sigur Atli Justinussen.

Hann hevur í valstríðnum lagt serligan dent á ungdóms- og frítíðarlív, og hann ætlar sær at arbeiða fyri tí, hann hevur ført fram.

– Eg veit ikki, hvørja ávirkan eg kann fáa, men eg ætli mær at standa við tað, sum eg havi sagt í valstríðnum, sigur hann.

Steinbjørn setti met

Við 391 persónligum atkvøðum setti Steinbjørn Jacobsen met í Klaksvík. Borgarstjórin seinastu fýra árini var fullkomuliga ovfarin av góða valinum

Steinbjørn Jacobsen var tann heilt stóri atkvøðuslúkurin til býráðsvalið í Klaksvík. Hann fekk 391 atkvøður

BÝRÁÐSVAL 04
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Klaksvík: Borgarstjórin seinastu fýra árini, Steinbjørn Jacobsen, hevði eitt gott val í Klaksvík. Hann fekk knappar 400 persónligar atkvøður, og tað er sum skilst mest nakrantíð til eitt býráðsval. Undan honum hevði Jógvan við Keldu metið. Tað mesta hann hevur fingið til eitt býráðsval er 330 atkvøður.

– Eg veit slettis ikki, hvat eg skal siga, segði Steinbjørn Jacobsen í valhølunum týskvøldið. Hann skiftivís tosaði í telefon, heilsaði upp á fólk, sum komu at ynskja honum til lukku og tosaði við fjølmiðlarnar.

Samstundis var hann óivað byrjaður at hugsa um samgongumøguleikar longu tá. Men hann fekk tó stundir at seta seg niður eina lítla løtu til eitt stutt prát um hansara óføra góða val.

Merkt stuðul

Steinbjørn sigur, at hann hevði ikki droymt um, at tað fór at gangast so væl til valið. Men hann viðgongur tó, at hann teir seinastu dagarnar upp undir valið, hevði merkt, at fólk vóru positiv og stuðlaðu honum.

– Men tað er so ótrúliga torført, tí tú veitst jú veruliga onki frammanundan. Tað eru bert gitingar, segði Steinbjørn og legði afturat, at hann hevði so stóra framgongd til seinasta val, og tí væntaði hann ikki so stóra framgongd aftur til hetta valið.

Til býráðsvalið í 1996 fekk Steinbjørn Jacobsen 77 persónligar atkvøður. Í 2000 hevði hann stóra framgongd og fekk 230 atkvøður. Og týskvøldið var framgongdin aftur stór, tá hann við 391 atkvøður varð afturvaldur.

– Hetta taki eg sum eina kvittan fyri, at tað arbeiðið, sum býráðið hevur gjørt hesa seinastu setuna, er gott, segði ein ovurfegin Steinbjørn Jacobsen, sum samstundis takkaði øllum sínum veljarum fyri dygga stuðulin.

Hann vildi tó ikki siga nakað serligt um samgongu ella samráðingar. Tað einasta hann vildi staðfesta var, at sitandi meiriluti var varðveittur, og hann sostatt kann halda fram, um tað ber til. Men Steinbjørn dugdi eisini at siggja aðrar møguleikar.

Gunvá við Keldu:

Eg gjørdi ein innsats

Ein av nývaldu býráðslimunum í Klaksvík er Gunvá við Keldu. Hon fekk 148 atkvøður, og má tað sigast at vera óføra gott. Hetta var fyrsta ferð, at hon stillaði upp til býráðsval, men hon rak dúgliga upp undir valið

Telefonin hjá Gunvá við Keldu ringdi allatíðina, eftir at tað var greitt, at hon varð nývald í Klaksvíkar býráð við 148 atkvøðum

BÝRÁÐSVAL 04
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Klaksvík: Gunvá við Keldu hevði ikki væntað at fáa so nógvar atkvøður, men segði tó, at hon hevði gjørt ein innsats fyri at sleppa inn.

– Eg havi bæði skrivað og tosað við fólk, so eg lá ikki á latu síðuni undir valstríðnum, segði hon.

Hjartamálini hjá Gunvá eru serliga vinnulívið og mentanin. Í einari av sínum valgreinum hevði hon millum annað eitt uppskot um, at skúlin verður tikin burtur úr mentanarnevndini.

– Eg meini avgjørt, at skúlin skal hava nógvar pengar. Tað er slettis ikki tað, men eg haldi, at mentanin líður eitt sindur undir tí. Tí haldi eg, at tað kundi verið skilagott at gjørt eina skúlanevnd ella okkurt líknandi, sum bara hevði til endamáls at taka sær av skúlamálum, sum eru átreingjandi, segði Gunvá við Keldu.

Spurd um hon ikki væntar, at fólk fara at siga, at tað er pápi hennara, sum hálar í træðrirnar, svaraði hon flennandi, at tað vil so vera.

– Tað fara fólk óivað at halda, men pápi og eg eru øgvuliga ymisk. Fyri tað fyrsta eru vit hvør sítt kyn, og vit hugsa als ikki á sama hátt um fleiri viðurskifti, men sjálvandi eri eg sprottin úr tí politiska umhvørvinum, sum eg vaks upp í, segði Gunvá.

So hjartansfegin

Sum vera man var fult hús á Kráargøtu, tá úrslitið av býráðsvalinum var klárt. Systkin, foreldur, familja og vinir vóru savnað í íbúðini hjá Gunvá við Keldu, sum varð nývald í Klaksvíkar býráð.

Telefonin ringdi allatíðina, og Gunvá var fyrndargláð. Fólk komu inn og hálsfevndu hana og ynskti henni til lukku.

Jógvan við Keldu var avbera stoltur av dótrini, og tosið gekk aftur og fram um valúrslitini aðrastaðni eisini.

Jóannes Hansen, sum var viðmerkjari í sjónvarpinum hevði á orði, at tá Jógvan stillaði upp til býráðsvalið í Klaksvík fyri fyrstu ferð fekk hann um 100 atkvøður. So dóttirin sló pápa sín væl og virðiliga. Hetta vakti látur millum gestirnar hjá Gunvá, og sjálv smíltist hon bara so glað, so glað.

– Eg eri ordiliga glað fyri, at eg varð vald, men tað er kanska ikki gingið rættiliga upp fyri mær enn, segði Gunvá.

– Nú ræður um at fáa ávirkan

Kristian Eli Zacharisen tók sær av løttum eina løtu eftir valið týskvøldið, og tá vóru eisini stundir til ein breyðbita
Mynd: Solby Eliasen

– Málið næstu dagarnar er at koma við í meirilutan, tí tað er har, at tú veruliga fært ávirkan, sigur stjørnuskotið hjá Sjálvstýrisflokkinum, Kristian Eli Zachariasen

BÝRÁÐSVALIÐ
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Fyrstu ferð hann stillaði upp á býráðsvali, vann hann á einum tí mest roynda politikaranum í býráðnum.

30 ára gamli Kristian Eli Zachariasen er nýggja stjørnuskotið í lokalpolitikkinum í Klaksvík, og nú ætlar hann at tryggja sær ávirkan í býráðsarbeiðnum.

– Tað fyrsta, eg skal arbeiða við næstu dagarnar, er, at eg ikki endi í minnilutan. Aftan á tað ber til at fara í holt við tað, sum eg havi ført fram í valstríðnum, sigur Kristian Eli Zachariasen.

Hann tók seg fram um Karl Hera Joensen, sum eisini hevði framgongd í atkvøðutalinum á valinum hesaferð. Endin var, at tríggjar atkvøður vóru á muni millum teir báðar.

Hugaður at halda fram

Seinasta fýra árini hava Tjóðveldisflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin verið í meiriluta, og møguleiki er fyri, at hesir flokkar halda fram við samstarvinum.

Í øllum førum høvdu teir avtalað, at teir seinnapartin mikudagin skuldu hittast at tosa um framtíðar samstarv.

– Allir flokkarnir, sum hava verið við í meirilutan, høvdu framgongd á valinum hesaferð, og tað má vera ein álitisváttan til samstarvið. Tí haldi eg, at tað er ein góður møguleiki fyri, at vit kunnu halda fram, sigur Kristian Eli Zachariasen.

Veljarar í ymiskumaldri

Kristian Eli Zachariasen stillaði fyrstu ferð upp á løgtingsvalinum seinast, og tá fekk hann fleiri enn 70 atkvøður.

Nú valdi hann so at royna seg í kommunalpolitikki eisini, og hann varð valdur í fyrstu royndini – við 93 atkvøðum.

– Eg havi havt góð fólk rundan um meg, sum hava hjálpt mær við valstríðnum. Eg havi helst fingið nógvar atkvøður frá ungum fólki, men eg havi eina hóming av, at veljararnir hjá mær eru í ymiskum aldri, sigur hann.

– Í øllum førum eru tað fleiri fólk, sum eg als ikki kenni, sum er komin til mín og hava sagt, at tey hava stemmað fyri mær. Kanska hevur okkurt av tí, sum eg havi ført fram í valstríðnum, gjørt mun.